## Mótmæltu ovveiði

Umleið 200 fólk vóru í gjár uttan fyri høvuðsskrivstovuna hjá ES í Bruxelles og mótmæltu, at alt ov nógv verður fiskað av fleiri fiskasløgum í ES-sjógvi. Fólk bóru skelti við ymsum áheitanum so sum at steingja leiðir, so stovnarnir kunnu koma fyri seg. Onnur søgdu, at verandi politikkur er miseydnaður. Mótmælistiltakið hevði samband við, at fiskimálaráðharrarnir hjá ES-londunum tingast í hesum døgum um kvoturnar í 2008.




## Pisa-spurningar á netið

Nú ber til hjá einum og hvørjum at síggja dømi um spurningar, sum vóru settir næmingunum í PISA kanningini 2006. Nógv orðaskifti hevur verið um, hvussu uppgávurnar í PISA 2006 vóru umsettar. Eitt nú hevur verið ført fram, at uppgávurnar helst vóru á einum máli, sum næmingarnir ikki skiltu.Mentamálaráðið hevur tí gjørt av at leggja nakrar av uppgávunum frá PISA 2006 út á netið, so ein og hvør sjálvur kann døma um umsetingina av PISA-uppgávunum á www. mmr.fo/Default.asp?sida=633



*– Vit kundu fingið nógv meiri burtur úr, um vit vóru saman við aðrari kommunu, sigur Soffi Egholm, eitt av umboðunum fyri minnilutan í Kvívíkar kommunu*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Ein skamblettur á Válunum

**Tá arbeiðið í bygdaráðnum byrjaði, gjørdist Soffi greitt, at hóast kommunan ikki var millum tær stóru, kundi nógv gerast fyri at menna hana**

KOMMUNA

*Snorri Brend*

Soffi fekk eyguni upp fyri nógvum fadesum, sum undanfarin bygdaráð høvdu gjørt. Hon nevnir millum annað bátahylin á Válinum. Soleiðis sum hann liggur í dag, er hann - sambært Soffi - einki minni enn ein skamblettur og eitt úrslit av vánaligum vilja til samstarv.

- Hetta virkar fyri mær sum ein gordiskur knútur, sum núverandi bygdaráð ikki er ført fyri at loysa. Tja, tað er ein stórur spurningur um ein yvirhøvur hevur viljan til at loysa hann.

– Vit hava roynt at fáa meirilutan í bygdaráðnum at geara um og broyta hugsan, soleiðis at kommunan kann mennast. Men hetta hevur ikki gingið eftir ætlan, slær Soffi fast.

At hon hevur hesa hugsanina kemur av, at hon greitt hevur sæð teir møguleikar sum finnast í heimbygd hennara, Leynum.

### Bilpláss vanta

Tey flestu kenna helst Leynar vegna stóran og vakra sandin, sum um summarið savnar hundrað- ella túsundtals føroyingar, tá veðrið er til vildar.

Her kundi ein skapa umstøður og veitt tænastur, soleiðis at fólk løgdu pening eftir seg her í bygdini. Stórur tørvur er á bilplássum til øll tey vitjandi, - ja, har er ikki meiri enn eitt einstakt wc til øll hesi.

Var eitt bygdarhús á Leynum, kundi ein skapt møguleikar fyri eini tænastu til tey vitjandi, og ikki minst til bygdarfólkið sjálvt, tá tey skuldu skipa ein føðingardag, kristiligar fundir ella onnur tiltøk.

Á Válinum kundi ein lættliga skipa eina marina, har møguleiki var fyri inntøkum og arbeiðsplássum.

- Tað er púra greitt, at ein bátahylur skapar ikki nakað arbeiði. Men mær tykir at ambisjónirnar fyri at fáa eitt virksemi í gongd, eru ikki til staðar.

– Hetta undrar meg almikið, tí vit liva jú trods alt av tí, sum hevur við sjógvin at gera, sigur hon.

### Ynskja samstarv

Tað er einfalt at skilja, at Soffi og hini umboðini av Stykkinum og Válinum als ikki eru nøgd við samstarvið og visjónirnar fyri eina góða og mennandi kommunu.

Tey hava tí bæði hugsað um, kannað og beinleiðis spurt seg fyri um møguleikan at fáa eitt veruligt samstarv í lag við Vestmanna kommunu.

Ein kanning varð gjørd millum bygdarfólkið við spurningi um eitt framtíðar samstarv við Vestmanna. Í øllum bygdum var rættiliga stórur meiriluti fyri hesi ætlanini.

Hetta hava vestmenningar tikið ímóti við opnum ørmum, men samstarvið kann ikki fáa í lag fyrrenn meirilutin í Kvívíkar kommunu sigur gott fyri tí – tað er: at bygdaráðslimirnir úr Kvívík geva loyvi til at Skælingur, Leynar, Stykkið og Válurin fara upp í Vestmanna kommunu.

– Eg skilji tað so, at tað er ein negativt ladaður arvur frá gamlari tíð sum forðar fyri, at hesar báðar kommunurnar verða lagdar saman í framtíðini.

- Vit hava longu so nógv saman – og kundu fingið so nógv burtur úr eini samanlegging – at eg dugi ikki við mínum villasta fantasi'i at skilja, hví ein ikki kann byrja at tosa um eitt samstarv. Men nei, her er so nógv gamalt agg sum forðar, at vilji til at fáa gongd á hetta er púrasta burtur, slær hon fast.

at hetta var ein pinkulítil sókn, og at tað vóru mong viðurskifti, sum ikki vóru nóg góð og sum ein kundi gera nakað við.

– Nógv fólk her í bygdini komu til mín og søgdu frá hugsanum og ætlanum, sum ein kundi fara undir. Men eg merkti samstundis á teimum, at tey tóktust so máttleys:

- Tað var eins og tað ikki loysti seg hjá teimum at koma fram við hesum góðu hugskotunum. Tey vunnu ikki frama kortini, sigur hon.

### Sum at spæla sjavs

Eftir valið kundi Soffi staðfesta, at hon hevði fingið næstflestar atkvøður á sínum lista. Saman við henni vóru eitt umboð av Stykkinum og eitt av Válinum vald.

Tey løgdu seg út í valstríðið við eini skrá, sum hevði til endamáls at skapa grundarlag fyri menning í økinum. Grundøkir til byggihugaði fólk og annað skuldi fáast til vega, soleiðis at fólk bæði kundu og vildu flyta higar at búgva.

Sjálv vónaði hon, at eitt munagott samstarv kundi fáast í lag við umboðini fyri hin listan, hvørs umboð øll vóru vald í Kvívík. Men soleiðis kom altso ikki at ganga.

Hon merkti rættiliga skjótt, at arbeiðið í kommununi bygdi á prinsippið í kortspælinum sjavs: Tað eru "vit" og "tit" sum stríðast móti hvørjum øðrum.

– Jú, sært tú, - ein tosaði um okkara kommunu, sum um hon var í tveimum: At bygdirnar rundan um vóru fyri seg í einum bólki, og Kvívík fyri seg í einum øðrum.

- Eg ynskti at fáa brotið hetta fastlæsta mynstrið, soleiðis at allar bygdirnar kundu fáa nakað burturúr. Og hví skuldi eg ikki tað?! Eg meini so við, - vit eru hóast alt í somu kommunu, sigur Soffi álvarsom.

## 150 fólk fleiri eftir 100 árum

Leynar hoyra undir Kvívíkar kommunum, og er ein bygd har tað búgva omanfyri 100 fólk í dag.

Í bygdarskúlanum eru fimm næmingar og tað skilst, at fleiri børn eru undir skúlaaldur. Fólkatalið hevur verið í støðugum vøkstri seinastu 22 árini. Í 1985 búðu 70 fólk her og 20 ár seinni var talið tað mesta – 122. Í summar búðu 113 fólk í Leynum av teimum íalt 615 í kommununi.

Soffi er sera áhugað í, at talið av íbúgvum í kommununi og serliga í Leynum fer at vaksa enn meiri í framtíðini. Ein treyt fyri hesum er, at fólk fáa møguleika at búseta seg.

– Tað vísir seg, at tað er sera truppult hjá fólki at fáa grundøki í Leynum. Tey, sum ynskja at búseta seg her, verða víst til grundøki í Kvívík, sigur Soffi undrandi.

Eitt uppskot til byggisamtykt fyri Leynar er til góðkenningar, men tað dregur út, samstundis sum bíðilistin eftir grundøkjum bara gerst longri og longri og fólk ótolnast í sama lutfalli.

Hon er tí sannførd um, at minst 100 fólk fleiri áttu at kunnað búsett seg í Leynum. Kvívíkar kommuna kundi í roynd og veru verið ein stór kommuna, um rætt var atborið. Øki, sum kundu verið útstykkjað til grundøki, eru til taks.

Soffi vísir til hagtølini yvir fólkatalið, sum tala sítt týðiliga mál: Seinastu 100 árini er fólkatalið í Kvívíkar kommunu einans vaksið við 150, meðan fólkatalið í grannabygdini Vestmanna er vaksið við 1000 í sama tíðarbili!

– Vit mugu skapa umstøður, soleiðis at fólk vilja búseta seg her. Truppult er hjá fólki at fáa grundøki í Havn og tað vísir seg samstundis at grannabygd okkara í Vágum, Sandavágur er vaksin nógv.

– Hesi fólkini koyra framvið her hjá okkum. Spurningurin er bara, hvussu leingi vit skulu finna okkum í tí. Verður einki gjørt her, kann bygdin ikki vaksa. Tað sigur seg sjálvt, slær Soffi fast.

## Meiri í morgin

**Vit hava biðið borgarstjóran í Kvívík, Boje Christensen um viðmerkingar til útsagnirnar frá Soffi Egholm. Hesar viðmerkingarnar koma í blaðið í morgin. Her vísir hann millum annað á, at tey í bygdaráðnum hava ymiskar ætlanir í kommununi, men at tey bíða eftir at fáa nýggja bygdarplanin góðkendan. sb.**